# Óður sjúklingur leyp á lækna í Havn



*Ein kommunulækni í Havn kom illa fyri nú eitt kvøldið, hann hevði vakt, tá ið ein sjúklingur leyp á hann*

**Tá ið læknin noktaði honum heilivág, gjørdi hann ikki mætari enn at sláa læknan niður**

HARÐSKAPUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað kann vera ótespuligt at vera lækni. Eisini í Føroyum.

Tað mátti ein kommunulækni í Havnini ásanna ein dagin í farnu viku, hann var á vakt.

Skipanin við kommunulæknar er broytt, so nú situr ein einsamallur kommunulækni á vakt á Landssjúkrahúsinum.

Men læknin, sum hevði vakt seinasta mikukvøld, kom rættiliga illa fyri, tá ið ein sjúklingur kom í viðtaluhølið um níggju tíðina á kvøldi.

- Talan var um ein mann, sum eftir øllum at døma hevði meiðslað seg umborð á skipi, sigur Bergleif Brimvík á kriminalløgregluni.

Maðurin vildi hava pínustillandi heilivág frá læknanum, men tá ið læknin ikki vildi geva sjúklinginum heilivágin, hann vildi hava, gjørdist maðurin ágangandi og sló læknan.

Læknin varð raktur í andlitið, men fekk ikki stóran skaða.

- Ein portørur var nærhendis og tað eydnaðist honum at taka mannin og halda honum.

## Skerpandi umstøður

Málið er meldað til løgregluna og maðurin varð handtikin og tað gongur nú sína gongd.

Men tað er lítið at ivast í, at seinasta orðið er ikki sagt í málinum.

- Læknar eru at meta sum tænastumenn í arbeiði og tað er álvarsligt at gera seg inn á tænastumann í arbeiði, staðfestir Bergleif Brimvík.

- Sostatt er talan um skerpandi umstøður og tí kann maðurin vænta sær eina hampiliga revsing fyri álopið.

Í øðrum londum hoyra vit javnan um, at læknar, sum eru á vakt á náttartíð, viðhvørt koma illa fyri, tá ið sjúklingar ikki fáa tær sømdir frá læknanum, sum teir vilja hava.

Men Bergleif Brimvík veit ikki um, at slíkt er komið fyri í Føroyum áður.

Hann metir heldur ikki, at hetta eigur at føra við sær, at kommunulæknar, sum eru á vakt um kvøldið og um næturnar, eiga at fáa sær serliga verju ímóti óðum sjúklingum.

- Læknarnir í Føroyum fáa frið at útinna sítt arbeiði og vit taka hetta ikki sum annað enn eina einstaka hending, sigur Bergleif Brimvík.

Maðurin, sum slóð læknan, kann í minsta lagi vænta sær eina bót, men hann skal ikki vera bilsin, verður hann eisini dømdur at sita, tí at sláa tænastumann í arbeiði verður tikið í rættiliga stórum álvara.

FØROYA REIÐARAFELAG
FAROE SHIPOWNERS´ ASSOCIATION



Móttøka

Í sambandi við, at **Jákup Sólstein** fer frá sum formaður í Føroya Reiðarafelag, verður móttøka **hósdagin 29. november kl. 17-18** í fundarhølinum hjá felagnum.




Altíð tað nýggjasta
www.sosialurin.fo